# Lønarhækkingarnar burtur

Hóast øll fakfeløg seinasta árið hava gjørt sáttmálar, sum hava givið lutfalsliga stóra lønarhækking er hetta verri enn so nóg mikið í mun til stóra prísvøksturin. Tað er serliga matvøra og olja, sum er dýrkað. Umframt hetta hava vit seinastu árini eisini sæð ein stóran vøkstur á húsaprísunum.

Ógvusligu príshækkingarnar gera tískil, at flestu løntakarar í dag eru fátækari enn tey vóru fyri einum ella tveimum árum síðani.

Umframt at oljuprísirnir eru methøgir, loysir tað seg í dag betur at framleiða orku enn t.d. at gera mat burtur úr korni, hetta hevur havt við sær at prísir á korni, mjøli o.t. eru øktir nógv seinasta árið. Hetta sæst eisini aftur í prísunum á gerandisvøru, sum ávirkast av hesum.

Prístalið er fyri 2. ársfjórðing 2008 komi upp á 116,4. Prísvøksturin síðani 1. ársfjórðing í fjør, tá ið prístalið var 107, 5 er sostatt meir seinastu 15 mánaðirnar enn prísvøksturin hevur verið frá 2001 til 2007.

Tað ber ikki til, at gera nakað við altjóða prísirnir á eitt nú korni og olju, men landið hevur kortini møguleika umvegis mvg skipanina at ávirka prísirnar á gerandisvørum umframt at avtaka avgjaldið á olju til húsarhaldini.

**Skattaskipanin**

Spurningur er, um fólk yvirhøvur hava ráð at liva - hetta er serliga galdandi fyri tey við lægstu lønunum, tey sum hava sett búgv seinastu árini, lesandi, óarbeiðsfør og fólk, ið liva av veitingum frá tí almenna.

Seinastu árini er ein alsamt størri partur av skattainntøkunum í landinum komin inn í avgjøldum, men avgjøldini eru ikki lutfalshækkandi, umframt at størri partur av inntøkuskattinum hjá fólki er umvegis kommunuskattin. Hetta vil siga, at tey við teimum lægru inntøkunum rinda lutfalsliga nógv í mun til inntøkuna. Bróðurparturin av skatta- og avgjaldsinntøkunum hjá landskassa og kommunum er lutfalsjavnur heldurenn lutfallshækkandi. Hetta merkir eisini, at breiðastu herðarnir ikki longur bera tyngstu byrðarnar eins og ætlanin annars er í skattaskipanum, sum eru lutfallshækkandi.

Verður mvg'ið á alneyðugum nýtsluvørum lækkað, ger tað tískil stóran mun serliga hjá teimum við meðal og lágum inntøkum, sum hava fleiri børn av forsyrgja.

**Lækkið mvg'ið og avtakið oljuavgjaldið**

Samtak mælir til at lækka mvg'ið á mjólk, breyð, mjøl, frukt, grønmeti og øðrum neyðugum húsarhaldsvørum fyri at lætta um umframt at avtaka avgjaldið á olju til húsarhaldini. Henda lækkingin hevði verið tann besti skattalættin, og hetta stig rakar eisini sosialt rætt.

Fleiri lond hava tveir ymiskar mvg satsir - Í Føroyum hevði borið til at varðveitt 25% mvg á flestar vørur og tænastur og so havt eitt lægri mvg á t.d. 10% fyri matvørur sum mjólk, breyð, mjøl, ger o.l.

Fyri húsarhaldið hevði eitt tílíkt tiltak verið kærkomið. Hetta hevði verið ein skattalætti, ið veruliga munaði hjá vanliga húsarhaldinum - serliga hjá teimum, ið hava fleiri børn at forsyrgja.

Hevði mvg'ið lækkað til 10% á neyðugum húsarhaldsvørum, so skuldi forbrúkarin einans rinda 10 kr omaná hvørjar 100 kr í mun til 25 kr, sum tað er í dag.

Verður mvg'ið á alneyðugum nýtsluvørum lækkað minka inntøkur landskassans nakað, men tann inntøkumissur verður uppvegaður við tí stóra gagni hetta hevði gjørt serliga hjá teimum við meðal- og lágum inntøkum. Um neyðugt, so ber til at hækka skattin hjá teimum sum forvinna oman fyri 400.000 kr við at seta eitt ella tvey skattastig inn afturat. Á henda hátt fært tú eisini økt lutfallshækkingina í skattaskipanina.

www.samtak.fo

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við



*Líkt er til at enn ein bygningur liggur fjaldur í lendinum Úti í Toft í Vestmanna*

*Mynd: H. D. Michelsen/Føroya Fornminnissavn*

# Fornfrøðilig rannsókn í Vestmanna

**Aftur í ár verður grivið í miðaldar bústaðnum Úti í Toft í Vestmanna**

FORNRØÐI
*Tíðindaskriv*

Aftan á forkanningina í 2005 hava fornfrøðiligar rannsóknir sumrini 2006 og 2007 avdúkað sera áhugaverdar bústaðaleivdir á staðnum. Talan er um ein bústað við upprunaliga trimum smærri bygingum, ið hava verið samantvinnaðir av eini steinsettari gong við veggjum úr gróti og flagi. Ein av bygningunum, ið uttan iva hevur verið sethús, er seinni umbygdur og longdur. Enn er hann ikki útgrivin innan, tvs. farið er ikki rættiliga niður í gólvflárinar, har væntast kann, at ymiskt áhugavert fjalir seg.

Undir hesum bygningunum eru funnar enn eldri veggjaleivdir, ið hava bogað skap. Kann talan fara at verða um bygning úr elstu miðøldini ella enntá úr víkingaøld? Hetta geva nakrir av funnu gripunum ábendingar um.

Útgrevstrarøkið er so hvørt vorðið víðkað. Í ár verður grevstrarøkið víðkað eystureftir, har líkt er til, at enn ein bygningur liggur fjaldur undir moldini. Til tess at fáa at vita, hvussu víðfevnd búsetingin hevur verið, verða leitiveitir eisini gjørdar sunnanfyri og norður frá grevstrarøkinum.

Tað er Vestmanna kommuna, ið ber kostnaðin av rannsóknini, ið verður gjørd í samstarvi við Føroya Fornminnissavn. Tey luttakandi hava verið forndfrøðingar og fornfrøðilesandi úr øllum Norðurlondum. Tey luttakandi í ár eru øll føroyingar undir dagligari leiðslu av Helga D. Michelsen, fornfrøðingi. Í ár er rannsóknin av ymiskum orsøkum avmarkað. Fýra vikur eru settar av til grevstrararbeiðið, sum endar um miðjan juli.

